

*Skrúðgongan við biskupi, dómprósti og høvuðspersóninum, Theodor Olsen á veg í kirkjuna*



*Jógvan Fríðriksson vígdi og innsetti sín fyrsta prest*



*Nærum allir teir føroysk*



*Kvívíkar kirkja var fullsett til fyrstu vígsluna og innsetingina av presti*

# Nýggi prestur

**Theodor E. D. Olsen er ikki meiri enn vígdur og innsettur sum prestur í Kvívík, fyrrenn fyrstu uppgávurnar liggja fyri framman. Hóast hann bert verður í starvi í tríggjar mánaðir í Norðstreymoyar prestagjaldi, verður talan um eina strævna tíð**

PRESTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Kvívík:** - Tað var ein sera hjartalig móttøka sum eg fekk í kirkjuni. Hetta var ein minniligur dagur, sigur nýggi Kvívíks-prestur.

Lagt varð upp til eina serstaka gudstænastu í Kvívík sunnudagin, tá Theodor varð innsettur sum prestur.

Hetta var nevniliga fyrstu ferð at ein prestur verður innsettur í hesi kirkjuni.

Hann skal virka sum avloysari fyri Marjun Bæk í tríggjar mánaðir í Norðstreymoyar prestagjaldi, og verður sóknarprestur hjá kirkjufólkinum í tí prestagjaldinum sum hevur flestar kirkjur.

- Tað var sera gleðiligt at síggja, at fólk og prestar vóru komin allastaðni frá til vígsluna, eisini úr Tjørnuvík og Haldórsvík, sigur Theodor.

## Fund við prestarnar

Í morgun byrjar so gerandisdagurin, og prestur fer at fyrireika seg til tær mongu uppgávurnar sum standa fyri framman.

Hóast hann bert skal virka sum avloysari í Norðstreymoyar prestagjaldi í tríggjar mánaðir, verður hann ikki arbeiðsleysur við tað fyrsta.

Umframt tær føstu gudstænasturnar í sóknini, verða nógvar føstugudstænastur á skránni tær sjey vikurnar í føstuni fram móti páskum, eins og aðrar skyldur.

Sunnudagur í føstuinngangi er longu 3. februar, og longu nú er greitt, at Theodor skal í øllum førum prædika við eina føstugudstænastu í Eysturoynni.

Fyrsta uppgávan til eina vanliga gudstænastan verður komandi sunnudag. Enn er ikki greitt, hvar henda gudstænastan skal verða, men tað verður avgjørt í morgin ella mikudagin.



- Eg fari á fund við hinar prestarnar í økinum fyrsta dagin, og tá fara vit at gera eitt yvirlit yvir, hvussu vit skipa gudstænasturnar í økinum, sigur Theodor.

Hinar prestarnir í økinum eru Inga Poulsen Dam í Vestmanna og Mogens T.